## Mugu verja tey brekaðu

Nógvar lógir skulu broytast, verður ST-sáttmálin um vernd og rættindi teirra brekaðu settur í gildi í Føroyum. Í dag stendur ongastaðni, at tað skal vera atkomiligt hjá fólki í koyristóli at koma inn á almenn støð. Tað sigur løgtingsins umboðsmaður sambært Kringvarpinum. Forkvinnan í Meginfelag Teirra Brekaðu í Føroyum, Laila Solmunde, hevur í fleiri ár stríðst fyri at bøta um korini hjá fólki við breki. Hon væntar, at ein hugburðsbroyting mótvegis brekaðum fer at fara fram millum fólk, um sáttmálin verður í gildi. Politikarar eru bjartskygdir, og vænta at ST-sáttmálin verður settur í gildi komandi ár, skrivar uf.fo.



## Carola kemur aftur við motorsúkkluni

Carola Häggquist, ið vitjaði í Føroyum um vikuskiftið, gjørdist bergtikin av føroysku náttúruni. - Eg finni næstan ikki orð fyri hesum - her er so friðarligt, segði hon við svenska blaðið Expressen, ið fylgdi við henni á einum fjalltúri leygardagin. - Higar vil eg koma aftur við míni Harley Davidson í summar og koyra runt á oyggjunum. Carola er kend fyri at dáma væl bilar og motorsúkklur. Hon koyrir oftani skjótt, og hevur mangan fingið bøtur, tá tað hevur gingið ov skjótt. Hon heldur nú á fram við síni konsertferð í Svøríki og skal í næstum til Finnlands at syngja.



*Rás2 húsast á loftinum í Miðlahúsinum í Vágsbotni*

# Kringvarpið ikki gott nokk

**Stjórarnir í báðum privatu útvarpsstøðunum í Føroyum, Jonhard Hammer og Preben Hansen, eru sannførdir um, at teir høvdu fingið meiri burturúr peninginum, ið Kringvarpið fær**

MIÐLAR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Preben Hansen og Jonhard Hammer, ið eru stjórar á ávikavist Lindini og Rás2, eru sannførdir um, at Kringvarpið kundi fingið meiri burturúr sínum peningi.

Í tíðargrein í blaðnum í dag, sigur Jonhard Hammer millum annað, at Kringvarpið fær eitt ókeypis sendinet og yvir 60 milliónir krónur í inntøkum, meðan Rás2 klárar seg við 6,5 milliónum um árið. Tó er tað soleiðis, at Annika Mittún Jacobsen greiðir frá, at 20 milliónir í veruleikanum fara til útvarpspartin. So munurin er ikki líka stórur.

### Lata pening til báðar rásir

Preben Hansen metir eisini, at tað er harmiligt at kringvarpið er eitt slag av almennum stovni, samstundis sum tað eisini fungerar eitt sindur sum eitt partafelag.

- Sum eg síggi tað, eru tveir ymiskir møguleikar. Antin skal kringvarpið vera fíggjað við almennum pengum, ella við lýsingum. Tað ber ikki til, at ein almennur stovnur skal hava so stórar fyrimunir í mun til tey privatu, so kanska skuldi Rás 2 eisini fingið pening frá landinum, greiðir Preben Hansen frá. Hann leggur tó áherðslu á, at Lindin ikki skal hava tílíkan pening, tí tað hevur skapt órógv aðrastaðni.



*Preben Hansen og Jonhard Hammer meta, at Kringvarpið fær ov lítið burturúr sínum peningi, samstundis sum kringvarpsgjaldið er nóg høgt*

### Tøkniliga aftanfyri

- Tøkniliga framgongdin í ólukkumát hevur ført djúpar rationaliseringar við sær kring allan heim. Snøgt sagt tí tær í dag ikki nýtist sama manpower til arbeiðið. Ella kanska er hesin parturin av tøkniligu menningini als ikki komin nær Sortudíki og at ein annar háttur kundi verið at útveitt uppgávur hjá stovninum í fría kapping, sigur Jonhard Hammer.

Preben Hansen, metir tó , at útvarpið kundi fingið nógv meira burturúr, um tey nýttu tøknina til fulnar, og ikki høvdu so nógvar millumleiðarar.

### Duga illa at stýra

Jonhard Hammer metir eisini, at kringvarpsstjórin skal pakka saman, um hon ikki klárar seg við peninginum hon hevur. Hann heldur í hvussu so er ikki, at tað er gott, at hækka kringvarpsgjaldið.

- Legg ikki fleiri byrður á Føroya fólk. Tú fært yvir 60 milliónir í inntøkum og eitt ókeypis sendinet, meir kann ein ikki forlanga í 2009, sigur hann millum annað eisini í blaðnum.

Eisini Preben Hansen tekur eitt sindur undir við hesum.

- Eg veit ikki ordiliga pengarensli hjá Kringvarpinum, men eg eri vísur í, at tey kundu fingið meira burturúr, teimum pengunum tey fáa.